# TILTØK

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Møti, sjónvarpsupptøka, kl. 11.30 steðgur við drekka.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 heldur Jógvan Z. fram við røðini: Sannleikar úr Rómbrævinum »Rættvísgjørd fyri einki av náði Hansara« (3:21-31). Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.00. Møti kann hoyrast á netinum www.livdin.fo
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Hannu Davidsen og Bodil Simonsen.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jógvan Lamhauge.
Mánadagin kl. 14.30 til 15.30 venur barnakórið, 1. flokkur og eldri. Kl. 20.00 Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18.00 Møti í Missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið, vitjan av Jónvør Christiansen.
Fríggjadagin kl. 20.30 Tey ungu samlast.
Sunnudag kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti við m.a. »Minns du sången« á stórskíggja.

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Sverra Steinhólm. Tensingkórið syngur.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 MiniSalt.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar, kl. 18.00 Evangel. møti við Elin og Hans Tausen. www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Bahá'i Miðstøðin í Gundadali**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Filadelfia Vágar,**
*Miðvágur*
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Òlavur Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Tom Skaale. Evni: Gávur/náðigávur. Nomi syngur.

**Saron, Vestmanna**
Hóskvøldið kl. 19.00 Barnaarbeiði.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Tórbjørn, Steintór og Harald. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen, kl. 11.30 Sunnudagsskúli.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið, Toftir**
Y. M. Barnaringurin skipar fyri jólastovu í missiónshúsinum leygardagin 19. nov. kl. 15.00. Tom Skaale greiðir frá arbeiðinum Ukraine. Børnini luttaka við sangi. Søla og burturlutan verður til frama fyri ytrimissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sí annars gulu síðurnar.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 21.00 Awake við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11.00.
Vælkomin í Kelduna.

**Nerija á Skála**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnudagin kl. 16.00, Sangkór úr Suðuroynni luttekur. John í Skemmuni og aðrir tala. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið á Hellunum**
Hóskvøldið kl. 20.00 Knút Larsen talar, Húsakórið úr Leirvík syngur.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Jógvan Fríðriksson talar, Hannis syngur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Sigfred Johannesen talar. Menn av Strondum syngja.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Niels Jacob Nielsen talar. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Kirkjukjallarin, Gøta**
Hugnaløta fyri tey ungu verður leygarkvøldið kl. 21.00. Møtið fjølment.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, Barnakórið venur aftaná. Kl. 18.00 verður Thabor-fundur.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Snorra Brend, evni »Hvussu skal ein trúgvandi fyrihalda seg til rúsdrekka«. Magni Christiansen syngur og innsavnan verður til Bláakross. Ungdómsmøti verður kl. 21.00 við Ásbjørn Bertelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvikan í KFUM & K, Klaksvík**
Hósdagin kl. 19.30 Møti, Alfred Olsen talar, Elsa Maria, Mariann og Sóleyð syngja.
Fríggjadagin kl. 19.30 Møti, Heri Elttør talar, Òli, Sólfríð og Gudrum syngja.
Leygardagin kl. 10.00 Kaffi, te og rundstykkir, Bíbliutími við Hera Elttør, kl. 19.30 møti, Heri Elttør talar. Streingjakórið í KFUM & K syngur, kl. 22.30 Ungdómsløta, Heri Elttør talar, Lovsangsbólkurin syngur, Drama verður framført.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta í Christianskirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Heri Elttør talar, Barnakórið syngur, Marta og Tummas Pauli Mýru syngja. Innsavnan til húsið, kl. 21.00 Eftirmøti, Tey ungu syngja.
**Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri.**
**Bønarløta er hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møtið byrjar.**
**Frá mikukvøldinum verður boðið til kaffi aftaná møti.**
**Boðið verður til samtalu og/ella forbøn. Ynskja tygum bil til møtini, eru tit vælkomin at ringja 457425.**

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Hendrik Olsen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við Deboru Bringsberg og André Matras og ung vitna.
Leygarmorgun kl. 10.00 Bøn og kl. 21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 er Morgunbøn. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna í Skálavík.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Missiónsvikan heldur fram. Leygarkvøldið kl. 20.00 tala Knút Larsen og Poul Jacob Lundsbjerg, Fuglafjørður. Gullak og Jónhilda syngja.
Sunnukvøldið kl. 18.00 tala Knút Larsen og Poul Jacob Lundsbjerg, Fuglafjørður. Gulak og Jónhilda syngja. Innsavnan til húsið bæði kvøldini. Øll vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar.
Týsdagin kl. 18.00 Juniorklubbur.

**Missiónshúsið í Vági**
Missiónsvikan heldur fram fríggja- og leygardagin kl. 20.00.
Sunnudagin kl. 18.00 v/ Regin Høgnesen og Jógvan Højgaard og øðrum, sangur Ebba og Nimrod, Kórið úr Porkeri og Kórið úr Sumba.

**Örkin, Reykjavík**
Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari vitjar Örkina 2.-5. des. Í hesum sambandi verður hugnaløta leygarkvøldið 3. des. kl. 20.30 og møti sunnukvøldið 4. des. kl. 20.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.




# Sansir søkja forritara
## at byrja sum skjótast

Ert tú forritari og leitar eftir avbjóðingum? So leita vit eftir tær. Sansir eru eitt samskiftisvirki, sum millum annað veitir fjølbroyttar loysnir innan internet og kunningartøkni.

Í løtuni starvast 20 fólk á Sansum harav fimm eru knýtt at internetdeildini. Vit nýta okkara egnu CMS skipan til at skapa dynamiskar loysnir, sum verða skraddaraseymaðar til virkir og felagsskapir. Tín uppgáva verður at vera við til at menna skipanina og gera serligar loysnir til einstaka virkið.

Tú hevur viðkomandi útbúgving ella hevur hollar royndir á økinum. Tú hevur kunnleika til ASP, og tað er ein fyrimunur, um tú kennir til ASP.NET.

Tú fært góðar møguleikar at menna teg – bæði fakliga og menniskjaliga. Vilt tú bjóða tínum kunnleika av, og hevur tú hug til at menna teg víðari í einum livandi umhvørvi saman við dugnaligum fólkum, so lat okkum hoyra frá tær.

Send umsókn við prógvum og møguligum viðmælum til:

Sansir
Att: Bárður Viberg Dam
Dvørgastígur 7
Postboks 1099
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. november 2005.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at skriva til Bárð á bardur@sansir.fo ella ringja 221 405.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo



Lesið
Sosialin
-so eru tit við!